2 árin
Telefon: 311820 Fax: 314720 E-mail: post@sosialurin.fo

# Lego fer undir barnasjónvarp

**BØRN.** LEGO, sum er best kend fyri at gera leikur, ætlar sær nú undir at gera sjónvarp fyri børn. Ætlanin er, at fyrstu sendingarnar, sum LEGO fer at framleiða, fara at verða sýndar kring heimin seint næsta ár.

- Vit ætla at gera okkum dælt av sjónvarpinum, tí tað er ein góður miðil til at siga søgur, og sjónvarpið kann seta hugflogið hjá børnunum í gongd, sigur kunningarstjórin hjá LEGO, Eva Lykkegaard við Ritzau.

LEGO hevur høvuðssæti í Billund í Jútlandi, men tað varð felagið LEGO Media, sum hevur skrivstovur í London og Los Angeles, sum skal standa fyri menningini av barnasjónvarpinum. Tað er væntandi, at sendingarnar, sum eru ætlaðar børnum og familjum, verða sýndar á skíggjum kring allan knøttin.

- Fyri fyrst tosa vit ikki um at gera nakra sjónvarpsrás burturav við okkara sendingum, men vit ætla at gera eitt samstarv, sum gera tað gjørligt hjá okkum, at vísa undirhaldið fyri børnum og foreldrum.

LEGO veit ikki enn, um teirra sendingar fara at snúgva seg um LEGO-persónar ella um verulig menniskju fara at vera við.

LEGO samráðist nú við feløg, sum kunnu hjálpa teimum at framleiða sjónvarpssendingar.

# Jane Aamund best umtókt



**BØKUR.** Jane Aamund er triðja árið á rað vald sum best umtókti rithøvundin í Danmark.

Vælumtókti rithøvundin fekk fleiri enn 28% av atkvøðunum, sum lesarar høvdu latið handilsketuni Bog & Idé.

Tað kemur ikki óvart á, at tað er Jane Aamund, sum aftur nú vinnur hesa heiðursløn, tí um hugt verður eftir sølulistunum sæst, at hon hvørja einastu viku av 1999 hevði í minsta lagi eina bók á topp 10.

Í fjør varð eisini ein av bókunum hjá Jane Aamund gjørd til film. Tað var við Mette Lisby í høvuðsleiklutinum í filminum, sum varð kallaður Klinkevalsen.

Talan er um eina triologi, og næsti partur í røðini varð frumsýndur 7. apríl og kallast Juliane Jensen

Sama dag fekk Jane Aamund heiðurslønina handaða

# Stjólu upplýsingar um Bill Gates

**INTERNET.** Ein tannáringur í Wales er handtikin, tí hann hevur stolið upplýsingar um eini 26.000 kreditkort, millum annað hjá tí hemsins mest múgvandi Bill Gates, sum stovnaði Microsoft-fyritøkuna.

18-ára gamli Raphael Gray er teldusníkur, og tað er á internetinum, at hann er komin fram at øllum upplýsingunum. Hann hevur brotið inn á heimasíður, sum selja yvir internetið, og haðani hevur hann fingið upplýsingarnar.

Fyri einari viku síðani handtók walisiska løgreglan hann, eftir at teir í samstarvi við amerikansku samveldisløgregluna, FBI, høvdu funnið fram til teldusníkin.

FBI sigur, at Gray og ein vinmaður hava snýtt fyri tríggjar milliónir dollarar, og at teir báðir høvdu sent NBCi, sum er eitt dótturfelag hjá sjónvarpsrásini NBC, upplýsingar um kreditkortið hjá Bill Gates og øðrum fólki.

Gray rópti seg fyri Curador, og hann breyt inn á nýggju ymiskar heimasíður, har hann fekk hendur á upplýsingunum um tey 26.000 kortini, sum fólk í USA, Kanada, Thailandi, Japan og Bretlandi eiga.

# Óneyðugar kanningar kosta lív

**HEILSA.** Vánaligt samskifti í danska heilsuverkinum ger, at tíggjutúsundtals óneyðugar røntgen-kanningar verða gjørdar. Hetta kostar mannalív og er stórt oysl av pengum, sigur ein professari í Århus við danska blaðið Jyllands-Posten.

Sjúklingar, sum líða av ryggsjúkum, koma í óneyðuga stóran vanda fyri at fáa lívshættisligt krabbamein, samstundis sum samfelagið oyslar við pengm, tí kiropraktorar og onnur í heilsuverkinum ikki samskifta við hvør annan.

Tað er Niels Egund, sum er yvirlækni á Kommunuhospitalinum í Århus, sum kemur við bersøgnu viðmerkingunum, og hann ætlar í dag at leggja síni sjónarmið fram á einum fundi millum læknar og kiropraktorar.

- Røngten er ikki vandaleyst, og kanningar av dønum, sum hava ryggsjúkur, hvørt ár kosta 10 fólkum lívið. Tað hevði sloppið undan fleiri av hesum, um røngtenmyndir hjá kiropraktorum vóru sendar saman við sjúklinginum til læknar og sjúkrahús, sigur Niels Egund við Jyllands-Posten.

Á hvørjum ári verða í minsta lagi 150.000 røntgen-myndir tiknar av sjúklingum við ryggsjúkum, men ein stórur partur av hesum myndum verða tiknar óneyðugt innan stutta tíð.

**Subject:** Teldubræv
**Date:** Tue 11. Apr. 2000
**To:** post@sosialurin.fo
**From:** arnigreg@post10.tele.dk
**Reply to:** arnigreg@post10.tele.dk

TELDU-POSTURIN

# Vis dog respekt!

At bera seg virðiliga at, sjálvt um ein er ósamdur, gevur oftast respekt. Tað skal eg venda aftur til.

Ein trupuleiki, tá ið ein býr uttanlands, er, at tað ikki ber so væl til at fylgja við hvat hendir.

Fjølmiðlarnir siga sínar søgur, men smálutirnir liggja eftir. Teir noyðist ein ofta at gita sær til.

Soleiðis eisini nú álvarsligar samráðingar fara fram millum Føroyar og Danmark. Tann mynd, eg fái av samráðingargongdini, er gjøgnum donsku fjølmiðlarnar, Sosialin og Útvarpið, tá ið tað annars hoyrist á netinum. Og so sjálvandi gjøgnum telefonina.

Sterkasta informatiónskeldan eru donsku fjølmiðlarnir. Í løtuni fer ikki ein einasti dagur aftur um, uttan at onkur fjølmiðil umrøður viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Kanningar verða gjørdar fyri at finna fram til, hvat vanligi danin heldur um viðurskiftini, og hvussu stóran týdning teir halda tað hevur at varðveita sambandið millum londini.

Skal eg halda meg til hesa myndina, halda donsku veljararnir, at Føroyar bara skulu taka sjálvstýri beinanvegin. Samstundis eiga føroyingar at átaka sær allar fíggjarligar skyldur.

Tað hevur eydnast forsætitisráðharranum at gjørt føroyingar til eina tjóð sum bert krevur. »Nú hava danir goldið og goldið, men føroyingar krevja bert enn meira. Sjálvt eftir at hava loyst krevja teir meir.« Soleiðis útleggur Nyrup føroyska samráðingarútspælið.

Sum heild er tað hendan boðskap, donsku bløðini bera víðari. Tey fortelja eisini, at føroyingar als ikki eru samdir - helvtin vil hava loysing, meðan hin helvtin vil hava onkra aðra loysn.

Tá ið so føroyingar sjálvir eisini standa fram í donskum fjølmiðlum og siga, at teir als ikki standa aftanfyri tað, sum landsstýrið ger, ja, so fær mótparturin í samráðingunum góð kort á hondina.

Tá er tað torført at greiða vanliga dananum frá, at viðurskiftini nú líkjast ógvuliga nógv viðurskiftunum eftir Fólkaatkvøðuna í '46 og árunum til Heimastýrislógin kom í gildi 1. apríl 1948. Tað er eisini torført at greiða frá, hvussu føroyingar vóru viðfarnir í kreppuárunum fyrst í 1990-unum.

Tað er torført at greiða frá, hvørjar kenslur føroyingar tá høvdu mótvegis dønum. Tá vóru nógv fleiri fyri loysing enn nú, men vit gloyma so skjótt. Nú eru búskaparligu tíðirnar munandi betri í Føroyum, og tað ger, at vit finna okkum í nógv meira. Nú tykist tað hjá summum ikki alneyðugt, at føroyingar sjálvir hava avgerðarrætt og ábyrgd. Nú kunnu vit aftur liva við eini skipan, sum ikki er 100 prosent greið.

Sum eygleiðari er tað spennandi at síggja, hvussu meiningar broytast yvir eina lutfalsliga stutta tíð. Frá at alt var á gosi til nú, har krøvini til sjálvsavgerðarrætt ikki longur eru so ultimativ.

Ongin ivi er um, at danska stjórnin hevur fullan uppbakning í fólkatinginum til at trýsta føroyingar hart. Føroysku samráðingarfólkini fáa ein frammaná fyri og annan eftir. Og vanligi danin heldur, at tað er í lagi. Bert fá tykjast skilja tað, sum veruliga fer fram - og enn færri tíma at hoyra alla søguna. Tað tekur alt ov langa tíð, og so skulu tey sjálvi taka støðu.

Higartil sær út til, at tað hevur eydnast føroyingum at bera høvdið høgt. Tað havi eg stóra virðing fyri. Eg havi eisini stóra virðing fyri samráðingarnevndini, og teimum føroyingum, sum hava verið at sæð í donskum fjølmiðlum seinstu tíðina.

Tey hava í øllum førum borið seg virðiliga at.

Hinvegin ger Nyrup júst tað, sum danir altíð siga um onnur størri lond: tey trýsta síni sjónarmið ígjøgnum.

Tað ger Nyrup eisini, umframt at hann roynir at ræða føroyingar. Sum ein donsk kvinna skrivaði í Politiken herfyri:

»Nyrup! Hvis du vil af med Færøerne, så sig det. Men vis i det mindste respekt!«

**Árni Gregersen**
**Bornholm**



## FØÐINGAR

5. apríl fingu Vibeke Joensen og Njálur Niclasen, Hvalba, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3680 gr.

5. apríl fingu Nathalia og Anfinn Isaksen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3150 gr.

7. apríl fingu Magna L. Joensen og Mouritz L. Mohr, Fuglafirði, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 2800 gr.

7. apríl fingu Lis Nystrøm og Atli Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3900 gr.

7. apríl fingu Húngerð og Ben Arabo, Signabøur, eina dóttur. Hon var 47 cm long og vigaði 2850 gr.

7. apríl fingu Tórhalla Vanja Vestergaard og Thomas Lynggaard Madsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3250 gr.

7. apríl fingu Diana Andreassen og Hans Kristian A. Abrahamsen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 2950 gr.

8. apríl fingu Rosa og Eynar-Martin Kjærbo, Skopun, ein son. Hann var 48 cm langur og vigaði 2680 gr.

8. apríl fingu Miriann Hentze og Oddur Hentze, Sandi, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3650 gr.

9. apríl fingu Elin Kristina Gøthe og Petur Gaardlykke, Toftum, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4000 gr.

10. apríl fingu Regina Midjord og Martin Karl Olsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3600 gr.

10. apríl fingu Elsie Hansen og Haakon Magnus Djurhuus, Leirvík, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4320 gr.

11. apríl fingu Sheila Rein og Magni Skaale, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3200 gr.

## ANDLÁT

7. apríl
**Lona Bjerregaard Buch,** fødd Mikkelsen í Havn, búsitandi í Skovlunde, 92 ára gomul.
9. apríl
**Ketty Telling,** bús. í Keypmannahavn, 74 ára gomul.

## Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardag 15. apríl:* Pól Johs. í Horni, tlf. 444038
*Sunnudag 16. apríl:* Magnus á Stongum, tlf. 423006

**Norðoyggjar:**
Jaspur Petersen, tlf. 456400

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn

Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.

## Gullbrúdleyp

**Sunnudagin 16. apríl kunnu hjúnini Julina og Andrias Joensen, Skála, halda gullbrúdleyp. Vælkomst verður hjá soninum Jóan Jákup Joensen, Skála, sunnudagin 16. apríl frá kl. 15.00.**

**Sunnudagin 16. apríl hava hjúnini Jona og Eivind Gudmundsen, Sandavági, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni.**

## KIRKJUR & SAMKOMUR

### Føstugudstænastur

**Pálmasunnudag**
*Vesturkirkjan:* Heri Joensen kl. 11, *konfirmatión*
*Viðareiði:* Meinhard Bjartalíð kl. 11, altargongd
*Kvívík:* Inga Poulsen Dam kl. 12
*Hósvík:* Martin R. Jacobsen kl. 11, *konfirmatión*
*Vestmanna:* Uni Næs kl. 11, *konfirmatión*. (Broytt kirkjutíð: Í Vestmanna og í Kollafirði verður nú farið í kirkju kl. 11)
*Christianskirkjan:* Niels Pauli Danielsen kl. 11, *konfirmatión*
*Húsar:* Hans Eiler Hammer kl. 12, altargongd
*Leirvík:* Emil Olsen kl. 11, *konfirmatión*
*Hov:* Elsa Funding kl. 11, konfirmatión
*Porkeri:* Elsa Funding kl. 13
*Skála:* Jógvan Fríðriksson kl. 10.30, *konfirmatión*
*Havnar kirkja:* Bjarni Bæk kl. 11, *konfirmatión*
*Kaldbak:* Sonja Klein kl. 12
*Sandavágur:* David Johannesen kl. 12, altargongd
*Tvøroyri:* Petur M. Rasmussen kl. 11, *konfirmatión*. (Konfirmantarnir skulu møta aftur mikudagin 12. apríl kl. 14.30 í kirkjuni)
*Søldarfjørður:* Jónsvein Bech kl. 11, altargongd
*Fríðrikskirkjan:* Jónsvein Bech kl. 15, barna- og familjugudstænasta
*Argir:* Vilhelm Beck
*Sandur:* Jákup R. Hansen kl. 11, *konfirmatión*

### Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli. Kl. 18 fundur, har Dan Jacobsen talar og greiðir frá kristniboðsvirki í Mongolia.

### Ebenezer, Tórshavn
Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, sunnukvøldið kl. 18 evangeliskt møti og kl. 21 útimøti. Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.

### Meinigheitin í Hoyvík
Vikuskiftismøti verða í Hoyvíkar skúla í kvøld kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18, har Eivind Frøen úr Norra ella Gordon Hickson úr Onglandi tala.

Páskastevnan verður í Ítróttarhøllini á Nabb, har Eivind Frøen og Gordon Hickson tala og Jan Honningtal luttekur við sangi. Veri øll hjartaliga vælkomin.

### Páskastevna í Havn
Páskastevnan verður í Ítróttarhøllini á Nabb, har Eivind Frøen úr Norra og Gordon Hickson úr Onglandi tala, og Jan Honningdal úr Norra fer at luttaka við sangi. Veri øll hjartaliga vælkomin.

### K.F.U.K., Tórshavn
Pálmasunnudag kl. 15 verður limafundur í gl. Meinigheitshúsinum, nú býráðssalur, v/ Jenny Davidsen. Evni: K.F.U.K. fyri 80 árum síðan.

### Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 6: Morgunbøn. Í dag kl. 17: Landsbøn. Sunnudagin kl. 6: Morgunbøn. Sunnudagin kl. 11: Morgungudstænasta. Sunnukvøldið kl. 18: Møti v/ Hjørdis og Dánjal Petersen. Sunnukvøldið kl. 22: Útimøti (um viðrar). Mánadagin kl. 6: Morgunbøn. Mánakvøldið kl. 20: Bønarskúlin.

### Aglow, Tórshavn
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum í dag kl. 15. Allar kvinnur eru vælkomnar.

### Frelsunarherurin, Tórshavn
Pálmasunnudag: kl. 11 møti, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnukvøldið kl. 18: Møti við ungdómi av Argjum. Innsavnan til kirkju og barnaheim í Peru.

### Rhema á Hálsi
Sunnudagin kl. 17: Møti og sunnudagsskúli. Morgunbøn mánadag til fríggjadag kl. 6. Øll eru vælkomin.

### Meinigheitshúsið í Havn
Pálmasunnudag sunnudagsskúli kl. 14. Møti sunnukvøldið kl. 18, Manskórið skipar fyri. Innsavnan til ytrimissión.

### Nazaret í Kaldbak
Osvald Kjærbo talar á evangeliska møtinum sunnudagin kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Landsbókasavnið
J. C. Svabosgøta 16
Vibeke Schaffalitzky og Inger J. Hildershavn halda »Ein tími við Bíbliuni« mánadagin 17. apríl kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Meinigheitshúsið á Skála
Einki ungdómsmøti verður í kvøld, 15. apríl.

### Frá 1000 ára haldinum
Í dag, 15. apríl, kl. 16 heldur Inga Poulsen Dam, prestur, fyrilestur »Er kirkjan føroysk« í Selatraðar kirkju. Kristiliga Sangkórið syngur.

Í dag kl. 16 lesur Elsa Funding, prestur, fyrilestur hjá Axel Tórgarð um Pette Dass í dupultstovuni í Tvøroyrar Skúla. Tórshavnar Manskór syngur.

Í dag kl. 16 heldur David Johannesen, prestur, fyrilestur um Martin Luther í Glæmuni í Kvívík.

Í dag kl. 16 verður konsert við Føroya Symfoniorkestri í Christianskirkjuni í Klaksvík. Stabar Matas - Solistar: Elsba S. Dalsgarð og Daisy Johannesen.

Sunnudagin kl. 15 verður konsert við Føroya Symfoniorkestri í Gøtu kirkju. Stabar Matas - Solistar: Elsba S. Dalsgarð og Daisy Johannesen.

Sunnukvøldið kl. 19.30 verður konsert við Føroya Symfoniorkestri í Vesturkirkjuni. Stabar Matas - Solistar: Elsba S. Dalsgarð og Daisy Johannesen.

### Keldan í Skálafirði
Leygarkvøldið møti kl. 20, vitjan av Eivind Frøen og Gordon Hickson.

Sunnudagin kl. 17: Møti við Eivind Frøen og Gordon Hickson. Barnamøti kl. 17.
http://kort.olivant.fo/~keldan/

### Leirvíkar Blákrossfelag
Aðalfundur verður í Missiónshúsinum í Leirvík mánadagin 1.5.200 kl. 19.30.

### Møtiskrá
fyri Føroyatúr hjá Hera Elttør, trúboðara:
14.-15. apríl: KFUM&K í Klaksvík.
16. apríl: Hvannasund
18. apríl: Tabor í Fuglafirði.
19. apríl: Sandavágs Missiónshús.
20. apríl, skírishósdag: Glyvra Missiónshús.
21. apríl, langa fríggjadag: Meinigheitshúsið i Tórsh.
23. apríl, páskadag: Gudstænastu á Skála. Á páskastevnu á Strondum um kvøldið.
24. apríl, 2. páskadag: í Skálavík.
25. apríl: Meinigheitshúsið í Tórshavn.
27. apríl: Missiónshúsið á Argjum.
30. apríl: Á Skála.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14: Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 18: Møti við Jens Vestergård og fleiri. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Betel, Vágur
Sunnudagin: Breyðbróting kl. 11. Sunnudagin kl. 13.30: Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 18: Evangeliskur fundur.
Mánadagin: Bønarfundur kl. 20.
Týsdagin: Ungdómsfundur.

### Samkoman Sion, Vági
Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 373777.

## 80 ár

**Í gjár fylti Gustav Müller í Vági 80 ár. Móttøka verður fyri honum í Betel sunnukvøldið kl. 19.00.**

## Silvurbrúdleyp

**Mikudagin 3. mai hava Jóna og Niels Juul Kristiansen, Æðuvík, silvurbrúdleyp.**

**Dagurin verður hildin 6. mai í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða silvurbrúðarparið við at koma, kunnu tekna seg í seinasta lagi 27. apríl á tlf. 448337.**

**Hósdagin 20. apríl hava hjúnini Ragna og Dánjal Olsen, Klaksvík, silvurbrúdleyp.**

**Opið hús verður í Stovugarðinum frá kl. 16.00.**

## Brúdleyp

**Leygardagin 15. apríl kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Gunnleyg Ihlen og Óli Gardshodn.**

**Brúdleypsadr.: Havnar Klubbi.**

**Leygardagin 22. apríl kl. 20.00 giftast í St. Magleby kirkju á Amager Camilla Bille Frandsen og Jógvan Elias Thomsen.**

**Eftir vígsluna verður móttøka í Krudthuset, Dragør. Um kvøldið er veitsla fyri innbodnum. Brúdleypsadressan er: Hollænderhallen, Halvejen 6, 2791 Dragør.**